FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA



Starvslýsing:

## WEB-HØGGUSLOKKUR

**KT-tænastan á Fróðskaparsetri Føroya leitar eftir fyrstafloks web-høgguslokki**

Við hesum verður lýst eftir fólki til KT-tænastuna hjá Fróðskaparsetri Føroya at byrja skjótast gjørligt. Setrið er í vøkstri, KT-kervið og krøvini til hetta er í støðugum vøkstri og uppgávurnar gerast alsamt fleiri og meiri fjølbroyttar. Tískil hava vit nú brúk fyri einum fjøltáttaðum KT-fólki við denti á kunnleika til nútímans webtøkni.

Starvið fevnir fyrst og fremst um menning og dagligt viðlíkahald av heimasíðuni www.setur.fo. Umsitarin skal røkja síðuna í neyvum samstarvi við úrvald starvsfólk á ymsu deildum Setursins. Fyrimun hava umsøkjarir við góðum førleika í grafikk-framleiðslu og myndaviðgerð og við royndum við CMS-skipanum.

Eisini hevur KT-Tænastan ymiskar menningar-verkætlanir í umbúna og fólkið, ið verður sett í starv, skal eftir førimuni eisini taka lut í hesum arbeiði. Grundleggjandi kunnleiki til arbeiði við nøkrum av fylgjandi: ASP, .NET, PHP, Perl, SQL, XML, XHTML, AJAX verður væntað av umsøkjara.

Harumframt kann roknast við onkrum uppgávum í samband við tann dagliga raksturin av Traðarnetinum.

Hevur tú onkran spurning um starvið, er tú vælkomin at senda teldupost til Óla Simonsen KT-leiðara, á olis@setur.fo. Eisini ber til at ringja til Óla í vanligari arbeiðstíð á 352570.

Umsókn við CV og prógvi um viðkomandi útbúgving og/ella royndir skal sendast til:

Fróðskaparsetur Føroya
ATT: KT-starv
J.C. Svabosgøta 14
FO-100 Tórshavn

Freistin at søkja er mánadagin 13. oktober 2008.

Lønin er sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo

KT-tænastan er deild hjá Fróðskaparsetrinum beinleiðis undir setursfyrisitingini, sum er dagliga leiðsla stovnsins. Tænastan hevur dagliga raksturin av Traðarnetinum um hendi; Traðarnetið er dátunetið hjá undirvísingar- og granskingarstovnunum á Debesartrøð, og veitir stovnunum ymsar tænastur, so sum Internet-atgongd, firewall, virusverju, teldupost-ambætara, filugoymslu, webhotell, backup, undirvísing, ráðveging o.a. Undirstøðukervið á okkara neti byggir m.a. á Cisco, Novell, VMware, Linux og Windows.

## Tavan søkir bókhaldara

### Starvið

Arbeiðsuppgávurnar eru í høvuðheitum:

- Lønaravgreiðsla
- Avstemmanir
- Faktureringar
- Telefonavgreiðsla

umframt allar vanligar bókhaldsuppgávur.

Bókhaldsskipanin Lundin verður nýtt, og lønarskipanin er frá Com-Data.

Talan er um eitt áhugavert arbeiði.

### Umsøkjarin

Vit vænta at umsøkjarin:

- Kann arbeiða sjálvstøðugt
- Hevur góð samstarvsevni
- Hevur telduførleika
- Hevur royndir innan bókhaldsyrkið

Lønin verður sett eftir nærri avtalu.

### Umsóknin

Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til:

**Tavan**
Stílað: Joen Magnus Rasmussen
Postsmoga 29
520 Leirvík

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi **14. oktober 2008.**

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Joen Magnus Rasmussen á telefon 443355 ella 212255.

*Tavan í Leirvík er eitt fiskavirki. Á Tavuni starvast umleið 60 fólk.*

STARVSLÝSING




## Deildarleiðari, avloysari

Mikrobiologiska deild á Heilsufrøðiligu starvsstovuni leitar eftir avloysara til starv sum deildarleiðari.

Sí www.hfs.fo ella www.portal.fo.

Freistin at lata umsókn inn er týsdagin 21. okt. 2008 kl. 12.

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 556 400
Fax +298 556 401
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo

Visti tú ikki tað? Sosialurin

Lesið Sosialin -so eru tit við!